# Tjóðbúni ella tjóvbúni?

NICOLINA JENSEN BEDER



**Frá tjóðbúna til karneval – ella bara eitt frítt val er heitið á áhugaverdari grein, ið Pól á Kletti hevði í Dimmalætting 20. august. Av tí at Pól endurgevur lýsingina frá Fornminnissavninum, ið lætt kann mistulkast, fari eg her at endurtaka lýsingina:**

**Frá gerandisklæðum til føroyskan búna**
Upp undir ólavsøku letur upp nýggj framsýning um føroysk klæðir á Føroya Fornminnissavni. Framsýningin nevnist Frá gerandisklæðum til føroyskan búna.

Á framsýningini verður serliga dentur lagdur á føroyska kvinnubúnan. Nøkur mannfólkaklæðir og eldri gerandisklæðir eru eisini við. Endamálið við framsýningini er at lýsa, hvussu klæðir við sama sniði sum búnin hava verið nýtt í eldri døgum, men á øðrvísi hátt enn búnin í dag. Frá at vera gerandisklæðir eru klæðini í dag vorðin føroyskir búnar.

Elstu klæðini eru frá uml. 1850, men framsýningin varpar eisini ljós á nýtsluna av føroyskum búnum í dag. Á heysti í fjør skipaði Føroya Fornminnissavn fyri myndatøku av kvinnum í egnum búna, sum høvdu latið seg í, sum tær plaga. Myndirnar sýna búnar úr ymsum tilfari, við ymsum litum og mynstrum og lýsa sera væl tey fjølbroytni, sum sermerkja føroyskar búnar í dag.

Orðingin í lýsingini, »Frá at vera gerandisklæðir eru klæðini í dag vorðin føroyskir búnar« er sera óheppin. Kann henda, at onkur slitin búni er vorðin nýttur sum gerandisklæðir, men neyvan stavar tjóðbúnin frá gerandisklæðum.

Pól skrivaði eisini nakað, ið eg ikki heilt var før fyri at skilja. – »Tey útvaldu, ið kalla føroysku klæðini »tjóðbúna«, ilskast og siga hesi nýggju klæðini líkjast karnivalsbúnum. Men hvør hevur autoriserað klæðini at vera tjóðbúna? Væl vita vit, at tað í øðrum londum eru sonevndar tjóðbúnaðnevndir [Hvat merkir sonevndar í hesum føri, tá ið sonevndar í vanligari týðing merkir niðrandi?], sum meta um og gera av, um ein búni er nóg bæriligur at umboða landið í almennum høpi – tað er at siga í almennum framførslum á stevnum heima og uttanlands.« – Her er ikki rætt fráboðað, tí í øllum Norðurlondum eru tjóðbúnafeløg og fastar reglur um, hvussu ein búni eigur at vera. tey hava fleiri ymiskar búnar í hvørjum landi, men ikki loyvi at broyta so mikið sum ein sting. Vit eru tey einastu, ið eru uttanfyri, einki tjóðbúnafelag, ongar lógarfestar reglur og ongan alsk ella virðing fyri siðvenju. Ynskiligt hevði verið, at eisini vit áttu eitt tjóðbúnafelag, tá kundu vit havt ein búna fyri hvørja oyggj ella hvørja bygd, um vit vildu havt fleiri ymiskar búnar.

Greinin hjá Póli endar við svarinum, hann fekk frá Súsonnu Skaale, ið er ein ung nútíðar kvinna. »Eg lati meg ikki stýra av øðrum. Eg lati meg í turkislitað turriklæði. Og eg haldi tað vera í lagi, at fólk sleppa tí traditionella og velja ymiskar litir til klæði síni.« Holger Drachmann, danskur rithøvundur (1848-1908), segði eisini »Jeg sætter min hat, som jeg vil«, men hetta savnar neyvan nakran samleika.

Egnu hugleiðingar um framsýningina á Fornminnissavninum og ymiskar myndir frá ólavsøkuni: Í frágreiðingini um framsýningina skrivar Fornminnissavnið: »Á heysti í fjør skipaði Føroya Fornminnissavn fyri myndatøku av kvinnum í egnum búna, sum høvdu latið seg í, sum tær plaga. Myndirnar sýna búnar úr ymsum tilfari, við ymsum litum og mynstyrum og lýsa sera væl tey fjølbroytni, sum sermserkja føroyskar búnar í dag.«

Tá ið eg stóð og hugdi at hesum fjølbroytni, rann mær til hugs orðini hjá Hans Andriasi Djurhuus, »Saman at halda var ei okkum givið«, og tað næsta, ið rann mær til hugs, var: Er hetta ikki júst tekin um tað føroyska sjálvsøkni og sundurlydni,





sum valdar í dag, har eg er vorðið fyrsta orðið bæði í talu og skrift? Nú ið so nógv verður tosað um gransking og ymisk evnir, hevði føroyskt sundurlyndi óivað verið eitt sera áhugavert evni.

Sum eygnariv (blikfang) var kjólin hjá Eivør Pálsdóttir – eitt føstulávintsskrímsl í besta stíli. Ymisk fyndarorð vóru hongd á veggin eins og mannakorn. »Nógv fólk brúka bara búnan eina ferð um árið. Eg royni at flætta hann inn í mín persónliga klædnastíl og harvið fáa meiri gleði burtur úr honum.« (Eivør Pálsdóttir). Um Sissel Kyrkjebø hevði gjørt á sama hátt við einhvønn búna í Noregi, hevði hon uttan iva fingið sekt.

Sjálvt havi eg altíð hildið, at heitini tjóðveldi og tjóðbúni hava ljóðað sera hátíðarlig. Men álvaratos, tá ið eg sá mynd av forkvinnuni í »Unga tjóðveldi« bjóða til ólavsøkufund í einum neyðtiknum føroyskum búna, gjørdist eg vónsvikin. Hetta var niðan fyri alt lágmark. Um hetta er framtíðarrák hjá Tjóðveldinum, hóskar betur, at teir býta bókstavin ð um við bókstavin v. Tjóvveldi og tjóvveldisbúni.

Enn syngja vit »Gud signi mítt føðiland Føroyar«. Hetta verður ivaleyst eisini broytt, áðrenn vit vita av.

# Guðloysingar í øðini

JOHN S. MYLLHAMAR



Fyrrverandi trúarfelagar hjá bretanum Antony Flew, ið hevur verið ein hin heitasti talsmaður fyri ateismuna – guðloysi, størsta partin av livi sínum, eru í øðini og ørkymlaðir, tí maðurin er fráfallin av teirri orsøk, at hann fær ikki at ganga upp, at lív kann koma av tilvild, og tí ikki kemur til aðra niðurstøðu enn at ein skapari má standa aftan fyri alt.

Hann hevur skrivað bókina “There is a God”, ið serstakliga Richard Dawkins og aðrir framstandandi guðloysingar, eru rasandi um. Men Antony Flew grundar trúgv sína á skaparan á, at hann faktiskt er tað design, sum er í skapanini, bæði í smáum og í stórum.

Hetta designið hevur hann eftir fleiri analysum víst á ikki kann henda av reinari tilvild. Við øðrum orðum sigur hann, at skapanin vitnar um, at tað er ein skapari.Tá ið ein so virkin guðloysingur, gjøgnum alt sítt stríð og djúpastu hugsan, ikki so mikið sum hevur megnað at sannføra seg sjálvan um, at alt er tilvildarligt, hvat so við einum felagi, ið einki endamál sigur seg hava, men bara skal ana við hvílandi limum?

# Vakurleikasvøvnur læknastjórans

KRISTIANNA WINTHER POULSEN
forkvinna í Javnstøðunevndini



Í tíðindunum hjá Kringvarpinum á døgurða 4. september var samrøða við Tummas í Garði, læknastjóra á Landssjúkrahúsinum, um fosturtøkuspurningin. Í samrøðuni ásannar læknastjórin, at Føroyar kanska ikki fylgja við í fakligu menningini, tá ið talan er um læknaliga viðgerð í sambandi við fosturtøku. Men hann vissar okkum eisini um, at hann svevur væl um náttina, fyri tað um fosturtøkuøkið ikki er spjótspíssurin í menningini á Landssjúkrahúsinum. Hesum hevur læknastjórin tað ikki ringt av.

At Føroyar kanska eru tilafturskomnar, tá ið talan er læknaliga viðgerð, er altso ikki nakar trupulleiki, tykist læknastjórin halda. Hendan fakliga hugburðin havi eg ilt við at skilja. Serliga tá ið tað er hægsti læknaligi myndugleikin á Landssjúkrahúsinum, sum umboðar hann.

Allar læknaviðgerðir kunnu hava eftirárin. So er eisini við fosturtøku. Men avbjóðingin fyri eitt nútímans sjúkrahúsverk má altíð vera at velja ta tryggastu viðgerðina, sum er gjørlig innan teir karmar, sum hetta sjúkrahúsverkið hevur at virka í. Heldur enn at stigmatisera ein sjúklingabólk, sum longu frammanundan stendur í eini svárari støðu.

Sambært tølum frá Landslæknanum fingu 41 kvinnur í aldrinum 15 til 44 ár fosturtøku í Føroyum í 2006. Hesar og allar aðrar kvinnur, sum hava verið og sum koma í somu støðu, mugu liva við at hoyra til ein sjúklingabólk, sum ikki verður nóg høgt raðfestur til, at leiðslan á Landssjúkrahúsinum vil arbeiða fyri støðugari betran og menning í viðgerðarhættum. Spurningurin er so, um tað er av tilvild, at tað júst er á fosturtøkuøkinum, at læknastjórin tykist lata standa til.

Vónandi gongur ikki ov long tíð, til læknastjórin vaknar úr sínum vakurleikasvøvni og spyr seg sjálvan og síni starvsfólk, hvat skal til, fyri at Landssjúkrahúsið kann veita eins góða viðgerð, sum viðgerðin, ið verður veitt í okkara grannalondum. So at tær kvinnur, sum av einihvørji orsøk skulu hava fosturtøku á Landssjúkrahúsinum, kunnu vera tryggar við, at eisini tær fáa ta bestu læknaligu viðgerðina, við minst møguligum eftirárinum. Uttan mun til privatu, moralsku áskoðanina hjá læknastjóranum og hjá øðrum starvsfólkum á Landssjúkrahúsinum.

Lesið Sosialin - so eru tit við